# Talva yvir frádráttarmøguleikar í sambandi við húsaleigu

| *Talvan er vegleiðandi. Mett verður altíð um í hvørjum einstøkum føri.* | **Lutvís útleiga**<br>Tá tú í einum álmanakkaári leigar út ogn ella part av ogn og eisini nýtir hana sjálvur. Tú leigar t.d. út í kjallaranum og býrt uppiá, ella tú leigar út alla ognina part av árinum og nýtir hana hin partin. | **Full útleiga**<br>Tá tú í eitt heilt álmanakkaár leigar út heila ogn og ikki nýtir hana sjálvur. Tú leigar t.d. út eini hús og býrt í øðrum. |
|---|---|---|
| **Rakstrarútreiðslur**<br>Leypandi útreiðslur til at halda leigumáli koyrandi, t.d. útreiðslur til streym, hita, rentur, trygging, ljósperur, mat til leigara, sápu, vesipappír, vaskiløn, privata ruskkoyring, internet, heimasíðugjald til Airbnb, bankakostnað til airbnb-kontu o.a. | **Kann hetta dragast frá?**<br>Ja. Frádrátturin skal svara til útleigaðar fermetrar. Verða 25 fermetrar útleigaðir av 100, er frádrátturin 25% av útreiðslunum. Frádrátturin skal eisini svara til tal á leigudøgum. Verður leigað út helvtina av árinum, er frádrátturin helvtina av teimum 25% av útreiðslunum. | **Kann hetta dragast frá?**<br>Ja. Frádrátturin er 100% av útreiðslunum. |
| **Viðlíkahaldsútreiðslur**<br>Útreiðslur til slit og brek, ið standast av nýtslu leigarans, t.d. útreiðslur til at skifta út slitin búnýti, mála slitnar veggir o.tíl. Eitt ávíst áramál skal ganga, áðrenn dragast kann fult frá. Verður drigið frá, áðrenn áramálið er farið, er frádrátturin tað minni.<br>*Sí skjalið: "Áramál fyri, nær viðlíkahalds-útreiðslur í sambandi við húsaleigu kunnu dragast frá."* | **Kann hetta dragast frá?**<br>Ja. Frádrátturin skal svara til útleigaðar fermetrar. Verða 25 fermetrar útleigaðir av 100, er frádrátturin 25% av útreiðslunum. Frádrátturin skal eisini svara til tal á leigudøgum. Verður leigað út helvtina av árinum, er frádrátturin helvtina av teimum 25% av útreiðslunum. Dragast kann ikki fult frá, fyrr enn ávíst áramál er farið. | **Kann hetta dragast frá?**<br>Ja, frádrátturin er 100% av útreiðslunum eftir ávíst áramál. |
| **Stovningarútreiðslur**<br>Útreiðslur til at stovna nýtt leigumál, t.d. leysafæ sum steintoy, neyðugt innbúgv, seingjarklæði, lampur o.a. og fastafæ sum tak, veggir, vindeygu og gólv. Talan kann eisini vera um útreiðslur, sum geva framíhjáumstøður í verandi leigumáli, t.d. at gera hitapott ella at lata bil vera part av leigumáli. | **Kann hetta dragast frá?**<br>Fastafæ kann ikki. Leysafæ kann avskrivast við 30% um árið. Avskrivast skal eftir útleigaðum fermetrum. Verða 25 fermetrar útleigaðir av 100, kann ein fjórðingur av 30% avskrivast um árið. Avskrivast skal eisini eftir tali á leigudøgum. Verður leigað út helvtina av árinum, kann helvtin av fjórðinginum av 30% avskrivast um árið. | **Kann hetta dragast frá?**<br>Fastafæ kann ikki. Leysafæ kann dragast frá 100%. |